Stjórin í Rúsuni:

# Matstovurnar avgera sjálvar, hvat tær hava á vínkortinum

**Elsa Maria Holm Olsen, stjóri á Rúsdrekkasøluni, sigur seg ikki vera samda í øllum kritikkinum, sum Leif Sørensen og Johannes Jensen bóru fram í Sosialinum fríggjakvøldið, har teir m.a. fýltust á úrvalið. Hon sigur, at teir kunnu fáa so at siga alt, teir ynskja til teirra matstovur**

## FAKTA

Í 2004 vóru 470 rúsdrekkasløg í fasta vøruúrvalinum (príslistanum), og Rúsdrekkasølan útvegaði harumframt umleið 300 aðrar vørur eftir serligum ynski. Tað vóru serstakliga skeinkistøð og matstovur, ið gjørdu nýtslu av hesi tænastu. Í 2005 var fasta vøruúrvalið økt til næstan 500.

Søla av vørum á príslista var í 2004 72 mill.kr. ella 69% av allari søluni og vørur, sum ikki eru á príslista 33 mill.kr. ella 31% av søluni.

Fyri 2003 var lutfallið fyri vørur á príslista 65 mill.kr. ella 60% av søluni og vørur sum ikki vóru á príslista 44 mill.kr. ella 40% av søluni.

Nýggjari hagtøl um úrvalið:
247 sløg av víni
35 sløg av heitvíni
132 sløg av brennivíni
19 sløg av øli
ialt 490 sløg

Um ein fløska av víni kostar 100 krónur í Rúsuni, er býtið hetta:

Innkeypsprísur: 40 krónur
Frakt: 2 krónur
Tollur: 18 krónur
Mvg: 19, 50 krónur
Pant: 2,50 krónur
Vinningur: 18 krónur

Árliga sølan hjá Rúsdrekkasøluni er uml. 100.000.000,00 kr.
Út yvir toll og MVG letur Rúsdrekkasøla Landsins eitt árligt avlop til Landskassan.
Í 2006 er avlopið ásett at vera: kr 11.848.000

RÚSDREKKAMÀL
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Í samrøðu við Sosialin í vikuskiftisblaðnum fýltust Leif Sørensen og Johannes Jensen, sum reka ávikavist Gourmet og Hotel Tórshavn og Hotel Føroyar, á føroysku rúsdrekkalógina.

Umframt at finnast at prísleguni í Rúsdrekkasølu Landsins, søgdu teir seg eisini vera ónøgdar við úrvalið.

– Við tí úrvali, sum Rúsan hevur at bjóða fólki, lærir tú fólk at drekka mongdarvín heldur enn góðskuvín. Eg tími ikki at koyra góðskuna hjá mær niður, men tað eri eg noyddur til við tí úrvali, sum er av víni, segði Leif Sørensen millum annað, og Johannes Jensen samanbar úrvalið á hvítvíni við eina “kiosk í Jútlandi”.

### Opin fyri kritikki

Elsa Maria Holm Olsen er stjóri á Rúsuni, og hon sigur, at tey eru opin fyri kritikki, men at hon ikki skilir júst handan kritikkin, tí úrvalið hjá Rúsuni er ikki bert tað, sum stendur á hillunum.

– Vit hava skyldu at veita kundanum ta vøru, hann ella hon ynskir. Tað er bert at koma við ynskinum, so bíleggur Rúsdrekkasølan vøruna og kundin fær tað, hann ella hon vil hava. Soleiðis er eisini við matstovunum. Matstovurnar keypa vanliga ikki ta vøru, sum Rúsdrekkasølan hevur standandi á hillunum

Matstovurnar hava sum oftast serlig ynski til øðrvísi vøru, og so bíleggur Rúsdrekkasølan hesa vøru til matstovurnar. Sostatt hava matstovurnar júst tað, tey vilja hava á vínkortinum, sigur Elsa Maria Holm Olsen.

### Prísirnir politiskt ásettir

Í vikuskiftisblaðnum fýltist Johannes Jensen eisini á, at eingin seljari frá Rúsini hevur verið hjá teimum tey seinastu 4 árini.

Til hetta sigur nýsetti stjórin, at endamálið hjá Rúsuni er at tálma nýtsluni, og tí hevur praksis higartil verið, at tey ikki fara út til viðskiftafólk at selja og harvið beinleiðis ávirka søluna, men at tað gera leverandørar harafturímóti av sínum eintingum, tá teir vitja í Føroyum. Leverandørarnir bjóða eisini matstovunum aðrar vørur, sum Rúsdrekkasølan hevur valt ikki at hava á hillunum. Um eitthvørt er, sum hotellini og matstovurna ynskja broytt, eru tey vælkomin at seta seg í samband við Rúsdrekkasøluna.

Stjórin leggur dent á, at tey eru til fyri kundarnar, men at prísirnar fáa tey ikki gjørt so nógv við, tí har hava tey lógarkarmar, sum eru politiskt ásettir.

Hinvegin metir hon ikki, at matstovurnar hava nakran trupulleika, tá talan er um úrval, av tí tað ber til at bíleggja so at siga alt rúsdrekka í heiminum heim til Føroya gjøgnum rúsuna.



*Elsa Maria Holm Olsen, stjóri í Rúsuni, skilir ikki kritikkin frá matstovueigarum*

Tó eru avmarkandi ásetinginar, tá tað kemur til øl og brennivín. Ølið má ikki vera sterkari enn 5,8 % og skal vera í íløtum, sum skulu endurfyllast við upprunaliga innihaldinum og brennivíni, sum ikki má vera sterkari enn 60 %.

Spurd um hetta ikki inniber, at keyparin noyðist at bíleggja í stórum nøgdum, sigur Elsa Maria Holm Olsen, at tað nýtist ikki at vera so. Tað ber til at bíleggja eitt slag av víni, og so fáa hetta heim við í einum vínkassa við 6 fløskum. At bíleggja ein vínkassa við 6 fløskum eigur ikki at vera nakar trupulleiki hjá einari matstovu.

- Fólk kunnu fáa øll sløg, tey vilja hava, tí vit kunnu útvega so at siga alt, sigur Elsa Maria Holm Olsen.

Eyka útreiðslur, kunnu tó standast av vørum, sum eru serliga torførar at fáa fatur á.

# Fútin ikki tikið støðu til Ole Wich

**Bill Justinussen heitti í gjár á fútan um reisa ákæru ímóti Ole Wich, men er ov tíðliga at siga, um fútin ger nakað við málið**

FRÍTT ORÐASKIFTI
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Í lesarabrævi í gjár heitti Bill Justinussen, løgtingsmaður fyri Miðflokkin, á fútan um at reisa ákæru ímóti Ole Wich fyri tað, sum í hansara verð minti um landasvik.

Orsøkin til hetta vóru myndir á heimasíðuni hjá Ole Wich, har hann tvinnar Merkið saman við tekstum sum t.d. “homoFObia”.

Sostatt hevur Bill Justinussen ikki meldað Ole Wich beinleiðis til løgregluna, men í rættargangslógini § 742 stk. 2, stendur skrivað: “Politiet iværksætter efter anmeldelse eller af egen drift efterforskning, når der er rimelig formodning om, at et strafbart forhold, som forfølges af det offentlige, er begået”. Sostatt kann ákæruvaldið fara inn í málið og ákæra listamannin. Ella við sum Finnn Ougaard





*Enn er ov tíðlig at siga nakað um, hvørt ákæra verður reist móti Ole Wich, sigur varafútin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

sjálvur orðaði seg við viðtali við Sosialin í morgun, so fylgir ákæruvaldið sjálvandi tí sum hendir í samfelagnum, og tí kann tað vera nóg mikið at heita á fútan í bløðunum um at reisa ákæru ímóti einum persóni.

Varafútin upplýsir tó, at enn er alt ov tíðliga at siga, um ákæra verður reist ímóti Ole Wich.

Mikið kjak hevur stungið seg upp av myndunum hjá Ole Wich, og hevur hetta ivaleyst eisini verið endamálið hjá honum, tí sum hann sjálvur segði í samrøðu við Sosialin í gjár, var eitt aðalmálunum við myndunum at fáa fólk at hugsa og taka støðu til málið samkynd og avgerðina hjá løgtinginum um ikki at flokka kynsliga orientering millum rasu, etniskan uppruna ella átrúnað í revsilógini.

Bill Justinussen er tó ikki tann fyrsti sum meldar í hesum máli. Stutt fyri jól var tónleikabólkurin 200 á løgreglustøðini í Havn og meldaði hvalvíkarprest fyri eitt lesarabræv, men tað málið bleiv víst aftur av fútanum. Í blaðnum í gjár róði Bill Justinussen fram undir, at hansara fráboðan til løgregluna var eitt aftursvar til meldingina hjá 200.